

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 06 - 2013

# Danski staturin mist 124 oljumilliardir

Danski staturin skal hava mist umleið 124 mia. kr. seinastu 10 árini sum ein avleiðing av Norðsjóvaravtaluni frá 2003. Hetta skrivar Politiken. Blaðið skrivar hetta við støði í tølum frá Skattamálaráðnum. Hóast verandi avtala við oljufeløgini hevur givið statinum stórt milliarda yvirskot, so hetta hevði verið enn størri, um lurtað hevði verið eftir serfrøðingunum í tí sonevnda kolvetnisbólkinum, sum kom við eini frágreiðing í 2001. Um tilmælini frá nevndini vórðu fylgd tá hevði yvirskotið verið 12 mia. kr. meira um árið ella 124 mia. kr. meira seinastu 10 árini. Eingin orsøk er til at ivast í tølunum frá Skattamálaráðnum. Við eini meira rímuligari skatting samfelagsbúskaparliga sæð, høvdu vit í Danmark kunnað havt ein betri búskap og verið betri før fyri at standa ímóti búskaparkreppuni, sigur búskaparligi vísmaðurin hjá donsku stjórnini. Eitt uppskot varð annars gjørt upprunaliga, sum hevði gjørt, at oljufeløg sum Maerks ístaðin fyri at gjalda 64% í skatti skuldu rinda 84%. Men hetta uppskotið kom ikki ígjøgnum, tá Nyrup stjórnin fall. Táverandi ráðharri Bendtsen vísir aftur greinini í Politiken og sigur, at hon er púra burturvið. Sambært honum var eingin annar møguleiki enn verandi avtalan.